# Veðrið



**Fimm-daga-for-søgnin frá DMI**

Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur, greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag**
Lot til andøvsgul av suðri og fyrrapartin sólglottar, men seinnapartin eitt skifti regn, annars támut veður. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og um middagsleitið regn. Seinnapartin andøvsgul av útnyrðingi og sólglottar. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 7 og 10 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Lot til andøvsgul av útsynningi og vestri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 4 og 8 stig.



*Nýggi stjórin í Ferðaráðnum í salongini á Ternuni, eftir at hava heilsað upp á umboð fyri ferðavinnuna í Norðoyggjum*
Mynd: Jens Kr. Vang

# Ferðavinnistjóri á ferð

Nýggi stjórin í Ferðaráði Føroya hevur nógv at læra.

Síðani hann tók við stjórastarvinum 1. apríl hevur Heri Niclasen kunnað seg við sítt nýggja arbeiðsøki, og ein liður í hesum er, at tosa við fólk í ferðavinnuni kring landið.

Í góðveðrinum týsdagin var hann í Klaksvík og hitti umboð fyri økisferðavinnufelagið í Norðoyggjum. Fimm tílik feløg eru í landinum, sum umboða ferðavinnu, handils- og vinnulív á staðnum, og sum m.a. hava kunningarstovunar undir sær. Felagið í Norðoyggjum er tað fyrsta sum fær vitjan av nýggja ferðavinnustjóranum.

Myndamaður okkara avmyndaði Hera Niclasen, nú hann er farin til verka í Ferðaráðnum. Myndin er tikin umborð á Ternuni, á veg heim aftur av fyrstu kunningarferðini. Í ferðalagnum vóru eisini tvey umboð fyri Ferðarráð Føroya og Petur Olivar í Hoyvík, stýrisformaður í Ferðaráðnum.




Hátrýstið vestanfyri Skotland fer í landnyrðing eystan og kuldabrúgvin við Føroyar fer eystureftir.




Hátrýstið við Føroyar fer í landnyrðing. Lágtrýstið vestanfyri Ísland fer í landnyrðing og brúgvalagið haðani fer um Føroyar leygardagin.




**Hitalagið mált frá 03./05. kl 06⁰⁰–04./05. kl 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,9°C**
Minsti hiti máldur í mai: **÷3,0°** Mesti hiti máldur í mai: **19,7°**




Avfallið: 0,4 mm – **mált frá 03./05. kl 6⁰⁰–04./05. kl 06⁰⁰**
Avfallið higartil í mai: 0,5 mm

## Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷2 |
| Nuuk | ÷3 |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 3 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | 6 |
| Seyðisfjørður | 7 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 8 |
| Aberdeen | 9 |
| London | 10 |
| Tromsø | 2 |
| Bergen | 10 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 10 |
| Keypmannahavn | 14 |
| Helsinki | 11 |
| Moskva | 9 |
| Berlin | 16 |
| Warzawa | 15 |
| Kiev | 15 |
| Bukarest | 16 |
| Paris | 12 |
| Madrid | 18 |
| Róm | 20 |
| Malorca | 20 |
| Athen | 18 |
| Malta | 22 |
| Tunis | 23 |
| Beijing | 24 |
| New Dehli | 35 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | 23 |
| New York | 17 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 20 |
| Meksikobýur | 22 |
| Panama | 31 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 11 |



# Stór dansistevna í Havn

*3-400 dansarar úr øllum landinum hitttast til dansistevnu annan leygardag 13. mai í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn*

Dansifrøi skipar í ár fyri stóru dansistevnuni, sum hevur verið hildin ymsastaðni í landinum síðani 1990.

Endamálið við stevnuni er at geva teimum, sum dansa gamlar dansir kring landið høvi til at hittast. Øll sum hava áhuga í gomlu dansunum eru vælkomin, siga fyrireikararnir.

Á stevnuni verður fyri tað mesta dansaðir gamlir dansir, men vanligir dansir so sum foxtrot, quick step og rock'n roll eru eisini við.

Dansarar, ið verða við á stevnuni eru m. a. úr Dansifrøi í Havn, Upp á Tá úr Vágunum, Dansigaman úr Húsavík, Dansistovugamni á Tvøroyri, Dansihugna úr Klaksvík, Anna Kirstin av Tvøroyri, Fragdini úr Sundalagnum, úr Nólsoy og øðrum dansibólkum kring landið.

GHM, Hilmar Joensen, Kristian Blak og fleiri fara at spæla.

Stevnan byrjar leygarmorgunin klokkan 9.30 við einum kaffimunni. Kl 10 verður stevnan sett. Kl 10.15 verður dansivenjing og klokkan 12.15 steðgur og okkurt til matna. Kl 12.45 verður dansivenjing til umleið klokkan 15. Hitst verður aftur kl 19.30 til døgurða, og frá kl 22 verður dansað til tann ljósa morgun.

Tey, sum ætla sær á stevnuna, kunnu keypa atgongumerki frá egnum felag, hjá fyrireikingarnevndini ella í Mótaskálanum. Seinasta freist er í dag 5. mai!!

Í fyireikingarnevndini eru: Andreas 213816, Ove 314855, Mia 316080, Jógvan Martin 316125, Erling 316063, Árni 31 6682, Ann Mary 317243

## Vestfalskyrrindi

4. mai: Tendring
6. mai: Mánin næstur jørðini

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp | sp | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp | sp | Hestfirði/Sundalagnum fp | sp | Vestmanna-sundi fp | sp | Mykines-firði fp | sp | Nólsoyar-firði fp | sp | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp | sp | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp | sp | Kalsoyarfirði/Svínoyarfirði fp | sp | Hvanna-sundi fp | sp | Fugloyar-firði fp | sp |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 4. mai | 7.28 | 19.47 | 6.28 | 18.47 | 6.43 | 19.02 | 9.28 | 21.47 | 10.28 | 22.47 | 5.43 | 18.02 | 4.43 | 17.02 | 7.43 | 20.02 | 8.43 | 21.02 | 7.13 | 19.32 | 8.28 | 20.47 |
| 5. mai | 8.06 | 20.24 | 7.06 | 19.24 | 7.21 | 19.39 | 10.06 | 22.24 | 11.06 | 23.24 | 6.21 | 18.39 | 5.21 | 17.39 | 8.21 | 20.39 | 9.21 | 21.39 | 7.51 | 20.09 | 9.06 | 21.24 |
| 6. mai | 8.43 | 21.07 | 7.43 | 20.07 | 7.58 | 20.22 | 10.43 | 23.07 | 11.43 | — | 6.58 | 19.22 | 5.58 | 18.22 | 8.58 | 21.22 | 9.58 | 22.22 | 8.28 | 20.52 | 9.43 | 22.07 |
| 7. mai | 9.25 | 21.47 | 8.25 | 20.47 | 8.40 | 21.02 | 11.25 | 23.47 | 0.07 | 12.25 | 7.40 | 20.02 | 6.40 | 19.02 | 9.40 | 22.02 | 10.40 | 23.02 | 9.10 | 21.32 | 10.25 | 22.47 |

Kelda: Skipalistin 2000